# Anfinn Kallsberg fangaður á skeiva beininum

**FLØKJA Í FÓLKAFLOKKINUM** Anfinn Kallsberg krevur, at samgonguskjalið skal haldast, men hansara egni floksformaður hevur góðtikið, at tað er ikki neyðugt

Áki Bertholdsen

– Anfinn Kallsberg er fangaður á skeiva beininum.

– Tað heldur Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Og kanska er nakað um tað, tí eftir tí, sum kom fram í Løgtinginum í gjár, er fløkja komin í ímillum Anfinn Kallsberg, formann í fíggjarnevndini og hansara egna floksformann, Jørgen Niclasen, sum eisini er landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Í gjár viðgjørdi Løgtingið eitt uppskot um, hvussu stór danska ríkisveitingin úr Danmark skal verða næsta ár.

Og eftir hansara uppskoti skal blokkurin næsta ár verða tann sami sum í ár

– Hetta er ikki als ikki rætta tíðin at frásiga sær inntøkur.

Men hann heldur somuleiðis, at broytingin er so lítil, at vit eiga ikki at taka hetta sum annað enn at alt stendur í stað.



**ALVORLIGUR TRUPULLEIKI**

*– Stendur Anfinn Kallsberg fast um síni krøv, kunnu vit vænta eitt mótkrav frá Sambandsflokkinum og so vænti eg, at vit hava ein alvorligan trupulleika, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum*

Hann staðfestir eisini, at samgonguskjalið er ikki ein lóg og er semja at víkja frá tí, er onki í vegin fyri tí.

Men hesum er Anfinn Kallsberg als ikki samdur í.

Hann leggur dent á, at Fólkaflokkurin stendur við avtalurnar í samgonguni og ætlar at halda tær.

– Sjálvt um talið er lítið, er tað rættiliga prinsipielt, heldur Anfinn Kallsberg.

Tí vil hann eisini hava, at blokkurin næsta ár skal lækka tær 400.000 krónurnar, sum hann eigur at lækka eftir samgonguskjalinum.

– Tað er umráðandi at halda fast um samgonguskjalið á hesum øki, legði hann afturat.

Eisini Jákup Mikkelsen, formaður Fólkafloksins á tingi, nevndi, hvussu stóran týdning tað hevur at halda fast um prinsippið um, at blokkurin skal lækka eftir avtaluni í samgonguskjalinum.

### Fangaður

– Eg haldi, at Anfinn Kallsberg er fangaður á skeiva beininum, segði Jóannes Eidesgaard.

Hann staðfesti, at tað er júst Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum, sum er samdur í, at danska ríkisveitingin skal vera óbroytt næsta ár.

Hann staðfesti eisini, at tað hetta er eitt mál, sum er viðgjørt í landsstýrinum og tað er sátt og semja um, at blokkurin skal vera obroyttur næsta ár.

– Og eisini Jørgen Niclasen hevur góðtikið, at blokkurin skal verða óbroyttir næsta ár.

– Tað eru ikki bara tríggir landsstýrismenn, men tað eru tríggir floksformenn, sum eru samdir um hetta.

Jóannes Eidesgaard ávaraði eisini um, at fer Anfinn Kallsberg at krevja, at blokkurin skal lækkast, kann tað føra til eitt mótkrav frá Sambandsflokkinum um at hann skal hækka, tí nettupp Sambandsflokkurin ført fram nakrar ferðir, at blokkurin eigur at verða hækkaður ella í minsta lagi at avtaka skipanina, har hann er frystur fastur á einum ávísum krónutali.

– So so vænti eg, at vit hava ein alvorligan trupulleika, segði Jóannes Eidesgaard.

*aki@sosialurin.fo*

## Sami blokkur

Jóannes Eidesgaard hevur lagt uppskot fyri tingið um, at næsta ár skal danska ríkisveitingin úr Danmark verða tann sama sum í ár, nevniliga 615,5 milliónir.

Annars stendur í ABC samgonguskjalinum, at ríkisveitingin skal lækkast 15% av veruliga av inntøkuvøkstrinum seinastu 5 árini.

Skal samgonguskjalið haldast, skal blokkurin sostatt minka 400.000 krónur næsta ár,

úr 615,5 milliónum, niður í 615,1 milliónir.

Landsstýrið metir kortini at henda lækking er ov lítil, tí verður ríkisveitingin ikki lækkað í 2011, sigur Jóannes Eidesaard.

## Endurnýtsla í Vági

Um vikuskiftið verður eitt serligt grønt átak í Vági, sum hevur til endamáls at fáa fólk at hugsa seg um áðrenn tey bara tveita burtur og keypa nýtt.

Tvørturímóti er endamálið at vísa fólki, at tað, tey tveita burtur, saktans kann verða til gleði og gagns hjá onkrum øðrum.

Tiltakið verður í Framtíðini í Vági og har kunnu fólk koma við brúktum barnaklæðum, leikum og barnaútgerð annars, og lata tað inn.

Somuleiðis stendur tað øllum er frítt at koma í Framtíðina at fáa sær ymiskt heim við, sum onkur hevur latið inn.

Tey hava lagt tað soleiðis til rættis, at í dag, fríggjadagin kunnu fólk koma við teirra klæðum og lutum frá klokkan 17 til 19.

Í morgin, leygarmorgun fra klokkan 10 til 13 kunnu fólk koma og fáa sær tað tey vilja hava, men tá ber eisini til at lata lutir inn

Sunnudagin frá klokkan 15 til 18 er opið og tá kunnu øll at koma at fáa sær tað tey hava brúk fyri.

Fyrireikararnir vóna, at fólk taka væl undir við átakinum.

Endamálið er at fáa okkum at hugsa um natúruna, eisini tá ið tað snýr seg um klæðir, leikur og barnutgerð og endamálið er eisini at royna at broyta inngrógvnu mentanina um at brúka, tveita burt og keypa nýtt.

# 108 milliónir til Boðanesheim og skúlar

**Tórshavnar býráð samtykti fíggjarætlan fyri 2011 á eyka býráðsfundi í gjárkvøldið. Fíggjarætlanin javnvigar við 611,7 milliónum, harav 108,8 milliónir eru íløgur**

Leo Poulsen

Íløgurnar hjá Tórshavnar kommunu verða komandi ár 108,8 milliónir krónur.

Meginparturin fer til skúlarnar í kommununi, serliga nýggja skúlan á Argjum, og so til nýggja Boðanesheimið.

32 milliónir krónur fara til nýggja skúlan á Argjahamri, meðan 22 milliónir verða settar av til Boðanesheimið. Serliga hetta seinna hevur drigið út, men nú verður sagt í viðmerkingunum til fíggjarætlanina, at ætlanin er at seta spakan í í hesum árinum.

Raksturin er mettur til 491,6 milliónir krónur, og miðað verður ímóti fleiri tilboðum til familjur, børn og ung. Somuleiðis verður sagt, at ungdómsarbeiðið verður raðfest høgt, og víst verður til virksemið á Margarinfabrikkini.

Ungdómsvirksemið í Hoyvík og í Nólsoy verður nevnt, og miðað verður ímóti at bjóða líknandi tilboð aðrastaðni í kommununi, serliga verður hugsað um Kollafjørð og Norðasta Horni.

»Børn og ung skulu hava bestu umstøður at takast við og gerast dugnaligari innan tónleikalist, og tí byrjar í 2011 projekteringin av einum nýggjum musikkskúla. Áhugin fyri tónleiki og at fáa tónleikafrálæru er stórur, og tað ger ein nýggjan musikkskúla aktuellan fyri nógvar familjur og borgarar«, verður sagt í viðmerkingunum.

Miðbýurin tykist vera eitt hjartamál hjá sitandi samgongu, og ætlanin er at gera eina trappu millum Vaglið og Tórsgøtu.

»Vaglið, sum fyri mong er sjálvt hjartað í Tórshavn, verður komandi árini umskapað, so ráðhústorgið bæði í sínum arkitektoniska úttrykki og borgaravenda virksemi gerst eitt livandi og spennandi býarrúm. Vaglið og Tórsgøta skulu eisini fáast at hanga betur saman við einari vakrari trappu. Kommunan vil tryggja, at allar broytingar fella væl og náttúrliga inn í umhvørvið og verður í samljóði við grannahús og byggingina á økinum sum heild«, stendur í viðmerkingunum.

Fíggjarætlanin var sum nevnt fyri í gjárkvøldið, og tað var eitt samt býráð, ið samtykti ætlanina.